umhvørvisstovan

# Ískoyti til umhvørvisgóðkenning

**hjá P/F Marine Harvest Faroes, mál nr.15/00293**

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Mowi Faroes** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Ternubrekkan 3, 695 Hellurnar | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Aling av laksi og síli | |
| Aliloyvi.: | Alifjørður: |
| C-12 | Sundini norður |
| Alistøð: | Aliøkið: |
| AS-12 | A-32<br>A-87 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 15/00293-102 | 19. februar 2020 |

Umhvørvisstovan, tann 19. februar 2020

Suni Petersen, deildarleiðari / Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

**Lýsing av umhvørvisviðurskiftunum**

Sambært viðløgdu upplýsingunum frá P/F Mowi Faroes verður samlaða útlátið frá alibrúkunum á A-32 og A-87 tað sama, men av tí at nýggja A-87 er størri enn tað gamla, er møguleiki til at hava meira fisk á økjunum enn nú.

Roknað verður við, at rákið í miðum sjógvi er umleið tað sama sum suðuri við A-32, í høvuðsheitum spakt suðurgangandi rák, men ábending er um, at tað er heldur betri rák við botn, har ætlanin nú er at leggja A-87. Umhvørvisstovan metir tó, at A-87 framvegis liggur soleiðis, at smáir og lættir bitlar frá fóðri og skarni reka suður í djúpara partin av Sundalagnum norður, har botnlagið kann verða læst av í meira ella minni mun hvørt summar. Av tí at hetta ger økið meira viðkvæmt, verður neyðugt at fylgja neyvt við hesum økinum. Tí verða treytir settar um gjølligar frágreiðingar frá alingin á A-87 og A-32. Streymmátingar verða gjørdar við A-87 á vári í 2020.

**Málsviðgerð**

Uppskot til ískoyti til umhvørvisgóðkenning varð sent alifelagnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Eiðis kommunu og Sunda kommunu til viðmerkingar 5. februar 2020.

Heilsufrøðiligu starvsstovan hevði nakrar upplýsandi viðmerkingar, alifelagið hevði ongar viðmerkingar, Eiðis kommuna hevði viðmerkingar, sum ikki vóru viðkomandi í hesum málinum og Sunda kommuna hevði ongar viðmerkingar.

**Góðkenningartreytir**

Umframt treytir í umhvørvisgóðkenning nr. 15/00293 hjá P/F Marine Harvest Faroes, nú P/F Mowi Faroes, frá 1. februar 2016, á aliloyvi C-12, verða niðanfyri standandi treytir lagdar afturat. Um

**1. Almennar treytir**

1.1 Henda umhvørvisgóðkenning er bert galdandi fyri alivirksemið á aliøkjum A-32 og A-87.

1.2 Um økisásetingin fyri aliøkið verður broytt ella víðkað, skal hetta góðkennast av Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan tekur støðu til, um neyðugt er at dagføra umhvørvisgóðkenningina soleiðis, at hon umfatar broytta ella víðkaða økið.

**2. Aliætlan og frágreiðing**

2.1 Í seinasta lagi ein mánað eftir, at allur fiskurin er tikin í einari útsetu, skal P/F Mowi Faroes senda Umhvørvisstovuni eina eftirmeting av útsetuni.

2.2 Eftirmetingin skal m.a. greiða frá gongdini gjøgnum útsetuna, herundir tal av fiski, hægsta biomassa, fóðurnýtslu, felli, úrslit og dálkingarstøðu sambært botnkanningum, sum eru gjørdar, nýtslu av avlúsingarevnum, nýtslu av rognkelsum og hvar tey eru framleidd, saman við einari ætlan fyri komandi útsetu.